


Á TCM leygarkvøldið kl. 20.00



*Klassikarin frá 1959, ið vann heilar 11 oskarvirðislønir - Ben Hur*

# Ben Hur

Ár null, og sjeynda árið í stjórnartíð Augustus Keisarans. Jødar koma til føðibý teirra at verða skrivaðir í manntal í rómverska landslutinum Judea. Yvir Betlehem skínir ein bjørt stjørna, ið ber boðini um at Jesus Kristus er føddur. Nøkur ár seinni ræður tann rómverski herovastin Messala (Stephen Boyd) fyri borgum í Jerusalem. Framsøkni Messala, ið er uppvaksin í Judea, hittir barndómsvin sín Judah Ben-Hur (Charlton Heston), ið er av jødiskari aðalsætt. Teir heilsast og lagið er gott. Men, tá Judah noktar at hjálpa Messala við at fanga mótstøðumenn keisarans kemur ilt í gamla vinarlagið. Messala tekur við fyrsta møguleikanum at hevna seg inná Judah. Hann verður sostatt dømdur í trældóm, meðan móðirin (Martha Scott) og systirin (Cathy O´Donnel) verða settar í fangilsi. Judah Ben-Hur lovar hevnd.

Í hesum filminum - grundaður á ta nógv róstu skaldsøguna eftir William Wyler - fellir søgan um tann hevndarhugaða Judah, á leitan eftir móðir og systir, saman við týðandi bíbilskar tilburðir. Herímillum er fjallaprædikan og krossfestingin. Og í filminum, sum vann heili 11 oskarvirðislønir, eru sjálvandi fleiri sera spennandi løtur; millum annað ein øgiligur bardagi á havinum og tann kenda filmsløtan, har Judah og Messala kappkoyra í stríðsvognum.

# The Gladiator

Søgugongdin í hesum stórfilminum frá 2000 fer fram í árinum 180 eftir Kristi føðing. Rómverska Ríkið strekkir seg nú út yvir tað mesta av Evropa. Undir eini herferð í Germania verður tann rættvísi keisarin Marcus Aurelius (Richard Harris) myrdur í loyndum av valdssjúka soni sínum Commodus (Joaquin Phoenix). Tann einasti, ið fær illgruna um at keisarin ikki doyði av náttúrligum ávum er tann trúgvi generalurin Maximus (Russell Crowe), sum Marcus Aurelius hevði valt sær sum arving. Commodus gevur tí ordrar um, at Maximus og familja hansara skulu avrættast. Commodus stríðist við bøðlarnar og vinnir á teimum, men hann fær ikki bjarga síni kæru familju. Illa sáraður endar Maximus í fangatippi hjá einum trælahandlara. Hann verður seldur - sum trælur - til Proximu, ið rekir ein gladiatorskúla. Proximu fær skjótt eyga á framúr góðu svørðkynstrini hjá Maximus. Maximus verður síðan sendur til Rom at berjast í sjálvum Colosseum, har almennu deyðsleikirnir undirhalda yvirstættini í býnum. Her fær hann aftur eyga á valdsharran Commodus, og tað einasta hann hugsar um er at hevna seg á Commodus. Men hann má stríðast fyri lívinum í gladiatorbardaga, har dráp og blóðigur harðskapur eru afturvendandi tættir. Maximus gerst nú kendur í øllum Rom fyri sín bardagakynstur og keisaradóttirin, Lucilla (Connie Nielsen), kennir Maximus aftur. Lucilla fær nú Maximus við í eina ætlan, ið skal beina fyri hennara ørliga bróðir, Commodus. Vandin er tó tann, at Commodus eisini hevur fingið eyga á sínum deyðsfígginda, og bardagin í Colosseum harðnar nú av álvara.

Á Kanal 5 mánakvøldið kl. 20.00



*Russell Crowe í leiklutinum sum Maximus*



*Gladiator, ein søga um svik og hevnd*



## FILMSTEIGURIN

# Bourneduellin

Jason Bourne var hvorvin. Hann vildi ikki finnast. Hann hevði fyri ævir allar valt at slíta við njósnaraverðina, har hann hevði verið ein tann frægasti, og goymdi seg nú hjá unnustu síni. Men so hevði onkur brúk fyri einum syndabukki.

Fingramerkini hjá Bourne verða funnin á gerningsstaðnum, har ein amerikanskur agentur er myrdur og ein stór peningaupphædd horvin. Samstundis verða Jason og Maria funnin av einum leigudrápsmanni, og bilur teirra verður dýktur undir í kúluregni. Harvið skuldi roknistykkið gingið út. Men Jason Bourne er ikki deyður. Hann er bara horvin enn einaferð, men hesaferð ikki fyri ævir allar. Tí Jason Bourne hevði givið eitt heilagt lyfti: Um tit ikki geva mær frið, so komi eg eftir tykkum.

Onkur hevur júst boðið heimsins besta drápsmanni aftur á banan. Tey skuldu havt latið hann fingið frið…

Matt Dammohn vendir aftur sum Jason Bourne, sum einsamallur bjóðar allari njósnaraverðini av í »Bourneduellin«. Brian Cox er aftur, sum gamli bossur hansara í CIA, meðan Joan Allen spælir tann nýggi leiðari, ið skal uppspora Bourne. Julia Stiles er eisini aftur sum gamli starvsfelagin hjá Bourne, Nicky. Poul Greengrass hevur leikstjórnað hendan eksplosiva agentthrillaran





# White Chicks

Brøðurnir og FBI-agentarnir Kevin og Marcus Copeland hava verið alt annað enn eydnuríki í teirra karrieru innan fyri FBI. Leiðslan gevur tí makkaraparinum ein síðsta møguleika fyri at rætta upp á fortíðarinnar mistøk, tá yvirklassadullurnar, Tiffany og Brittany Wilson skulu eskorterast av flogvøllinum til eitt fornemt galla-tiltak, tí vandi er fyri, at onkur ætlar at ræna tær. Men teir verða óhepnir enn einaferð, so teir verða noyddir at lata seg í kjóla og parykk og spæla tveir hvítar systrar. Og tað vendir upp og niður upp á sjálvt tað stívasta jetsettlívið í Hampton…!





**Frumsýning**
Fríggjadagin 08.10. kl. $20^{45}$ Fríggjadagin 08.10. kl. $23^{30}$
Leygardagin 09.10. kl. $20^{45}$ Leygardagin 09.10. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 10.10. kl. $19^{45}$ Sunnudagin 10.10. kl. $22^{30}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**







Fríggjadagin 08.10. kl. $19^{00}$ Fríggjadagin 08.10. kl. $21^{15}$
Leygardagin 09.10. kl. $19^{00}$ Leygardagin 09.10. kl. $21^{15}$
Sunnudagin 10.10. kl. $18^{00}$ Sunnudagin 10.10. kl. $20^{15}$




Fríggjadagin 08.10. kl. $17^{00}$ Leygardagin 09.10. kl. $17^{00}$
Sunnudagin 10.10. kl. $16^{00}$




Fríggjadagin 08.10. kl. $23^{00}$ Leygardagin 09.10. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 10.10. kl. $22^{00}$




Fríggjadagin 08.10. kl. $18^{30}$ Leygardagin 09.10. kl. $18^{30}$
Sunnudagin 10.10. kl. $17^{30}$




**Við danskari talu – Billettprísur: 55,- kr.**
Fríggjadagin 08.10. kl. $16^{30}$ Leygardagin 09.10. kl. $16^{30}$
Sunnudagin 10.10. kl. $15^{30}$